## Arbeiðsloysið í USA stórt til 2011



Greinarar hjá tíðindastovuni Bloomberg News siga tað vera væl hugsandi, at amerikanska arbeiðsloysið fer at tátta upp ímóti tíggju prosentum, áðrenn hetta árið er úti. Tann seinasta metingin hjá greinarunum sigur, at 9,4 prosent av amerikonsku arbeiðsfjøldini verður arbeiðsleys um ársskiftið, og at viðurskiftini fara ikki at broytast nakað munandi fyrr enn í 2011. Í síðsta mánað fór arbeiðsloysið í USA upp um átta prosent, og Bloomberg News skrivar frá greinarunum, at tað er als ikki vist, at tær 787 milliardir dollararnir frá stjórnini eru nóg mikið til at fáa búskapin á ta røttu kósina.

## Í hernað ímóti skattaskjólum

Fyrst í apríl fara ríkis- og stjórnarleiðarar úr teimum størstu ídnaðarlondunum og ES-londunum at tosa um, hvørji tiltøk skulu setast í verk fyri at forða einstaklingum og feløgum at fjala pengar í londum, ið virka sum skattaskjól. Á fundinum, sum verður í London, fara franski fíggjarmálaráðharrin, Christine Lagarde, og týski starvsbróður hennara, Peer Steinbrück, at leggja fram eitt uppskot, sum skal áleggja bankum og tryggingarfeløgum at geva skattavaldinum upplýsingar í slíkum málum. Í seinastuni hava fleiri lond, teirra millum USA, lagt dent á at forða fyri, at óskattaður peningur verður fjaldur uttanlands.



*Andrias Andreassen hevur verið einar tíggju túrar í Nólsoy, har hann hevur tilevnað eina standmynd av 97 ára gamla Richardi Jacobsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# 97 ára gamal modell

**Andrias Andreassen, myndahøggari, leggur í hesum døgum seinastu hond á eina bustu av 97 ára gamla nólsoyinginum, Richard Jacobsen**

MYNDLIST
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Listamaðurin Andrias Andreassen hevur í mong ár fingist við at gera standmyndir úr leiri. Serliga hevur han lagt seg eftir at gera sonevndar bustur – tað er myndir av leiri av høvdi og niður móti bringuni á fólki.

Hann hevur gjørt bustur av mongum kendum føroyingum. Vit kunnu nevna Olivur við Neyst, Jens Paula Heinesen, Amariel Norðoy, Eyðun Johannesen, Torbjørn Olsen, Sámal Ravnsfjall, Steinbjørn B. Jacobsen og Tobba Jacobsen. Fyri altso at nevna nakrar.

Hann ger eisini bustur eftir bílegging, og onkur av hesum hevur verið í sambandi við bøkur, sum Sveinur Tummasson hevur skrivað.

- Tá hann skrivaði bókina um Dávur í Tjørnuvík, heitti hann á meg, um eg vildi gera eina bustu av Dáva, og tað gjørdi eg so, sigur Andrias Andreassen.

Nú er Sveinur so í holt við at skriva eina bók um elsta nólsoyingin, Richard Jacobsen, sum í dag er 97 ára gamal. Hann hevur sum vera man nógvar lívsroyndir, og hevur upplivað tveir heimsbardagar millum nógv annað. Richard Jacobsen hevur verið bóndi alt sítt lív, og hóast høga aldurin, er hann framvegis frískur og ferugur.

- Tað er ikki soleiðis, at eg taki einahvørja uppgávu á meg uttan fyrilit. Eins og eg altíð geri, var eg eisini hesaferð úti og »skoðaði verkið«. Og tá eg sá Richard, var eg onga løtu í iva um, at hesa standmyndina vildi eg gera, sigur Andrias Andreassen.

### Gott tol

Hann hevur so ferðast út til Nólsoyar javnan og hevur eftirhondini skapt hesa bustuna, sum nú er um at vera liðug.

- Eg haldi, at eg havi verið í Nólsoy einar tíggju ferðirnar. Vanliga havi eg arbeitt einari tríggjar tímar tilsamans hvørja ferð, men slíkt arbeiði krevur konsentratión, og tí verið eg noyddur at fara út at ganga inn ímillum, fyri at klára høvd og eygu, sigur Andrias Andreassen.

Tað hevur sostatt tikið myndahøggaranum fleiri enn 30 tímar at evna standmyndina av Richard Jacobsen til, og Andrias Andreassen sigur, at ikki bert hevur Richard verið elsta modellin, hann hevur gjørt standmynd av, men eisini hin mest tolna.

- Hann hevur sitið púra stillur og hevur í heila tikið verið serstakliga lættur at arbeitt við, sigur Andrias Andreassen.

Heldur ikki Richard Jacobsen sjálvur heldur, at tað hevur verið serliga strævið at sitið modell.

- Nei, tað hevur ikki bilað at sitið stillur so leingi, sigur Richard Jacobsen.

Nú bustan er liðug, er hon ogn hjá Sveini Tummassson, men Andrias Andreassen vónar, at tað fer at bera til at lána hana, um tað skuldi verið.

- Tað hevði verið gott, um eg kundi lánt hana til onkra framsýning og líknandi, sigur myndahøggarin.

Hann fæst mest við at gera standmyndir, men fæst eisini eitt sindur við at forma aðrar figurar.

Vit vóru við, tá myndahøggarin var í Nólsoy mánadagin. Hetta var seinasti dagurin, at hann »fekk nakað meira burtur úr« Richardi, og hann hevði tí standmynd og annað tilfar við sær aftur til Havnar hendan dagin. Nú er bara endaliga fínpussingin eftir, so er standmyndin av 97 ára gamla Richardi Jacobsen liðug.